# Eg eri so glaður...

**Jenis av Rana kendi seg sum glaðasta mannin í heiminum, tá flokkur hansara hevði fingið tann hart tiltrongda tingmannin afturat**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

- Eg eri tann glaðasti maðurin í heiminum.

Soleiðis var støðan hjá Jenis av Rana, formanni í Miðflokkinum, valkvøldið. Vit vitjaðu hann heima, har hópin av vinfólki og stuðlum vóru komin á gátt. Lagið var óføra gott, og tað var kanska ikki so undarligt.

Miðflokkurin tvífaldaði sína tingmanning. Tað er kanska ikki so nógv at fara úr einum upp í tveir tingmenn, men fyri Jenis av Rana og Miðflokkinum er hetta næstan meira, enn teir - ja - kundu biðja um.

- Miðflokkurin er nakað serstakt í føroyskum politikki. Tað vita øll. Vit hava sæð í hesum valstríðnum at aðrir flokkar hava lagt seg uppat Miðflokkinum, sigur Jenis av Rana.

Tað sá annars ikki so ljóst út í veljarakanningunum undan valinum, men Jenis av Rana er ikki tann, sum leggur mest í veljarakanningar.

- Hetta prógvar enn einaferð, hvussu eftirfarandi veljarakanningar eru. Tær geva eg einki fyri. Vit verða altíð illa stillaðir í teimum, men tá samanumtikið gongur nógv betur, og tað gjørdi tað eisini hesaferð, sigur Jenis av Rana.



*Lagið var sera gott heima hjá Jenisi av Rana, tá valúrslitið var greitt. Nógv fólk stukku inn á gólvið, og øll vóru á einum máli um, at hetta var fantastiskt fyri Miðflokkin.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

### Breitt ikki betri

Tann dagin hetta blaðið er dagfest, hevur tingformaðurin kallað saman til eitt umfar, har flokkarnir hvør í sínum lagi skulu peika á ein samráðingarleiðara.

Hvønn peika tit á sum samgonguleiðara?

- Tað kann eg ikki siga nú. Tað hava vit ikki avgjørt enn.

Miðflokkurin hevur áður stuðlað Anfinni Kallsberg, men tað er ikki einstýðandi við, at Miðflokkurin fer at peika á hann sum samgonguleiðara. Jenis av Rana sigur annars um støðuna við málinum um Anfinn Kallsberg.

- Skal málið um, hvat Anfinn Kallsberg gjørdi fyri tjúgum árum síðani, so eiga vit eisini at hyggja at fýrsunum, har Grein 19 nevndin kom til ta niðurstøðu, at nógvir politikarar vóru sekir, men har valdi mann at leggja lok á, sigur Jenis av Rana.

Nógv prát er um eina sokallaða breiða samgongu við trimum av teimum størru flokkunum. Men Jenis heldur, at hansara møguleikar ikki minkast stórvegis av hesum prátinum.

- Vit hava sæð, hvussu nógv tveir stórir flokkar megna at klandrast, og tað lystir meg at vita, hvussu nógv tríggir stórir fara at klandrast, sigur Jenis av Rana.

Jenis av Rana metir Miðflokkin hava stórar møguleikar at koma í eina samgongu. Hann vil kortini ikki siga nágreiniliga, hvørji teirra treytaleysu krøv verða, men nevnir nøkur viðurskifti.

- Ein samgongu við Miðflokkinum skal verja tey kristnu virðini, vit mugu fara inn at bøta um familjupolitikkin og frælsisgongdin má halda fram, sigur Jenis av Rana.

### Valskipanin torskild

Formaðurin í Miðflokkinum sigur, at teir duga at síggja at verandi valskipan ikki riggar fult væl, men hann ivast í, um tað ber til at gera eina meira rættvísa skipan.

- Verandi valskipan er so torskild, at sjálvt teir sokallaðu serfrøðingarnir ikki hava fult greiðu á henni, sigur Jenis av Rana.

Spurdur, hvørt Miðflokkurin tekur undir við, at Føroyar skulu gerast eitt valstað, sigur Jenis, at flokkurin hevur tosað um hetta málið, og hann roknar ikki við, at tað verða tey í Miðflokkinum, sum fara at forða fyri hesum, tá vit vitjaðu heima hjá honum og familjuni seint týskvøldið.

# Ein sólskinsøga

**Hóast tað ikki eydnaðist Maluni Johansen, í fyrsta umfari, at vinna sæti á tingi fyri Sjálvstýrisflokkin, er hon ómetaliga fegin um góðu undirtøkuna. Malan fekk eitt rimmar val við 212 persónligum atkvøðum í Suðurstreymi**

LØGTINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Malan Johansen er nýggja stjørnuskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum. Hon fekk eitt rimmar val við 212 persónligum atkvøðum í Suðurstreymi.*

*Mynd: Jens K. Vang*

Nýggja valevnið hjá Sjálvstýrisflokkinum, Malan Johansen, fekk eitt rimmar val í Suðurstreymi. Hetta er fyrstu ferð, hon stillar upp og við heili 212 persónligum atkvøðum, kann Malan Johansen av røttum kallast nýggja stjørnuskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum.

– Eg eri øgiliga glað. Eg væntaði, um væl stóð til, at fáa eini 100 atkvøður, men at fáa 212, ja tað er heilt ótrúligt, sigur Malan Johansen

Spurd, um hví so nógvar atkvøður fullu í hennara lut, svarar Malan Johansen, at tað møguliga kemur av, at hon er kvinna. Hon leggur eisini dent á, at hon hevur fingið dyggan stuðul í flokkinum undir øllum valstríðnum

### Stillar upp aftur

Malan Johansen vil als ikki útihýsa møguleikanum fyri, at hon stillar upp aftur komandi løgtingsval. Hon heldur, at Sjálvstýrisflokkurin hevur góðar møguleikar at mennast og hon vil gjarna verða við í tí menningini.

Hon slær kortini fast, at hon ætlar ikki at stilla upp til býráðsvalið seinni í ár, tí tað er landspolitikkur, sum hevur hennara stóra áhuga.

### Møguligan tingsess

Sjálvstýrisflokkurin fekk aftur hesaferð bert ein eykavaldan tingmann. Kappingin um úr hvørjum valdømið tinglimurin hjá Sjálvstýrisflokkinum skal fella er rættiliga tøtt. Í løtuni stendur Kári P. Højgaard úr Eysturoyar valdømi at fáa tingsessin, men Malan Johansen úr Suðurstreymoyar valdømi er bert tvær atkvøður frá at gerast tingkvinna fyri flokkin.

Ein fínteljing skal gerast og tá fáa vit endaliga at vita hvør sjálvstýrismaður ella kvinna fera at røkja tingsessin hjá flokkinum



# Hetta er púra okey

**– Eg eri totalt blottaður fyri nervum. Eg kann alt nú, sigur Johan í Kollafirði aftaná eitt langt og drúgt valstríð**

LØGTINGSVAL
*Kristian E. Andersen*
*kristian@sosialurin.fo*



*Johan í Kollafirði er nú blottaður fyri nervum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Johan í Kollafirði tykist eitt sindur troyttur, nú valstríðið er av. Hann sigur, at kenslan er tann sama sum jólaaftan, tá allir jólafrokostirnir eru lidnir, og mann hugsar, at hatta var tað og gleðir seg til at byrja uppá okkurt annað. Hóast hann ikki kom inn á ting, er hann væl nøgdur.

– Eg havi tað púra okey. Kanska eitt sindur skuffaður av, at eg ikki fekk 50% av atkvøðunum, men eg hevði ikki tímað inn alllíkavæl, sigur Johan í Kollafirði.

### Gjørt fýra ting

Kollfirðingurin er sannførdur um, at tað týdningarmiklasta er nátt. Hann hevur fingið fólk at skilt sín boðskap.

– Eg giti, at fólk, sum hava lurtað eftir mær, hava skilt mín boðskap og hava hugsað seg einaferð um afturat, áðrenn tey settu krossin. Eg havi gjørt fýra ting í valstríðnum. Eg havi fingið fólk at hugsa seg um. Eg havi fingið tey at valt meg. Eg havi brúkt humor. Og eg havi brúkt filosofi, greiðir ein errin Johan í Kollafirði frá.

Spurdur um, hvat hann hevur lært, sigur hin stuttligi politikkarin, at nú kann hann alt.

– Eg eri totalt blottaður fyri nervum. Eg kann alt nú. Tað er einki sum eg ikki tori, sigur Johan í Kollafirði.

### Broytt valskipan

Johan í Kollafirði vísir á, at ein rúgvu av fólki hava vent sær til hansara og sagt, at tey ynsktu, at mann hevði tvær atkvøður í part. So skuldi hann nokk fingið eina. Men kollfirðingurin hevur eitt uppaftur betri boð.

– Eg haldi, at tað mest rættvísa í valskipanini hevði verið, at mann segði, hvønn mann ikki vildi velja, og so valdi mann restina, endar Johan í Kollafirði, sum eftir donskum mátistokki var komin inn á Fólkating. Har er sperrumarkið 2%.

# Okkara leiklutur er avmarkaður

**Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, væntar, at tríggir av teimum stóru flokkunum koma í samgongu. Leikluturin hjá Sjálvstýrisflokkinum sum miðflokki er tískil avmarkaður**

LØGTINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Sjálvstýrisflokkurin var enn einaferð tætt við at fáa tveir tinglimir, men tá avtornaði gjørdist teir ov stuttir og fingu bert tann eina tingmannin. Einans tvær atkvøður eru á muni millum Eysturoyar og Suðurstreymoyar valdømi og tískil er ikki endaliga avgjørt, hvør eykavaldi tingmaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum verður.

Í løtuni varðveitir Kári P. Højgaard sín tingsess, men nýggja valevnið hjá Sjálvstýrisflokkinum, Malan Johansen, er bert tvær atkvøður frá at taka tingsessin frá formanni Sjálvstýrisfloksins. Ein fínteljing verður gjørd, áðrenn tað endaliga verður staðfest, hvør fer at røkja tingsessin hjá Sjálvstýrisflokkinum.

### Norðoyggjar sviku

Kári P. Højgaard er fegin um, at tað eydnaðist Sjálvstýrisflokkinum at vinna sætið á tingi aftur men harmast samstundis um, at flokkurin ikki fekk tveir tinglimir, tí møguleikin var til staðar

– Tað gekk minni gott í Norðoyggjum hjá okkum. Fólkaflokseffektin(stuðul til Anfinn Kallsberg, blðm) og hørð innanhýsis kapping í Tjóðveldisflokkinum í Norðoyggjum var við til at gera okkara úrslit verri, sigur formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum



*Formaður Sjálvstýrisfloksins er fegin um, at Sjálvstýrisflokkurin kom á ting men harmast samstundis um at teir ikki fingu tveir mans. Hann metir ikki, at Sjálvstýrisflokkurin hevur bestu fyritreytir at koma í samgonga, tí hann væntar eina stóra trý flokka samgongu.*

*Mynd: Jens K. Vang*

### Tríflokka samgonga

Kári P. Højgaard er ikki so bjartskygdur um samgongumøguleikar hjá Sjálvstýrisflokkunum. Hann heldur, at tað er mest sannlíkt, at ein trýflokka samgonga verður mannað eftir valið og tá verður ikki brúk fyri teimum smærru flokkunum.

– Okkara leiklutur hesaferð er avmarkaður. Vit høvdu staðið munandi betri um vit høvdu fingið tveir mans, men nú stendur Miðflokkurin sterkari enn vit, sigur hann

Kári P. Højgaard vil einki siga um, hvør samgonga er fremst í huganum hjá Sjálvstýrisflokkinum. Til spurningin, hvørt Sjálvstýrisflokkurin ætlar at stuðla Anfinni Kallsberg sum løgmansevni, svarar Kári P. Højgaard, at tað nærum líka mikið, hvørja støðu Sjálvstýrisflokkurin hevur, tí teirra rødd verður neyvan avgerandi um Anfinn Kallsberg fer at halda fram sum løgmaður.

– Eg haldi kortini tað er lítið sannlíkt, at foransrundan prógvaði, at bæði Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkkurin ikki stuðla honum, sigur Kári P. Højgaard at enda.